Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Søgu- og samfelagdeildin
Department of History and Social Sciences

# Skeiðslýsing Heyst 2018
## *Course description*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 2671.16 |
| **Heiti**<br>***Title*** | Praksisskeið í projektleiðslu.<br><br>*Practical course in project management* |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 5 ECTS. |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Miðnámsútbúgving ella samsvarandi førleika.<br><br>*The students must have completed an Upper Secondary education or possess equivalent qualifications.* |
| **Stig**<br>***Level*** | Bachelor<br><br>Bachelor. |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | Ein alsamt størri partur av virkseminum í samfelagnum verður í dag skipaður í verkætlanir. Verkætlanir ganga ofta uppá tvørs av vanligu organisatorisku og fakligu mørkunum, og hava sínar serligu fyrimunir og vansar. Endamálið við skeiðnum er at geva studentunum eina grundleggjandi vitan um projektorganisatión og projektleiðslu, og at geva teimum høvi at royna hesa vitan í samband við eitt sjálvstøðugt projekt.<br><br>*In contemporary society an increasing number of activities are organised as projects. Projects often cut across formal organisational boundaries and scientific fields, and therefore have their own advantages and disadvantages. The purpose of this course is to give the students a basic understanding of project organisation and project management, and to give them an opportunity to test these approaches in their own project.* |
| **Innihald**<br>***Content*** | Undirvíst verður í grundleggjandi ástøði um verkætlan sum organisatións- og leiðsluhátt, og hvussu hesin háttur at skipa seg inngongur sum ein partur av øðrum organisatiónshættum í samfelagnum. Dentur verður lagdur á at fremja fatanina av, at verkætlanir einans kunnu útinnast og gerast veruleiki, um |

| | |
|---|---|
| | fyrilit verður tikið til tað umhvørvið og teir áhugapartar (kontekst), verkætlanin ávirkar og verður ávirkað av. Undirvísingin er skipað eftir teimum teinum (fasur), sum allar verkætlanir fara í gjøgnum (hugskot, stigtakan, fyrireiking, byrjan, fremjing og endi). Til hvønn tein verður undirvíst í endamáli, avgerðargrundarlagi, analysuamboðum og skjalfestingarháttum. Dentur verður lagdur á stigtøku- og fyrireikingarteinin, har studentarnir gera eitt projektgrundarlag, sum verður lagt fram á einum 'kick off' seminari (byrjunarteinurin), tillagað og avleverað sum ein synops. Í samband við fremjingarteinin verður undirvíst í projektstýring (fundir og raportering), og í samband við endateinin verður undirvíst í eftirmeting av projektinum.<br><br>*The students are taught basic theory about projects as an organisational and management form, and how project organised work fits in with other organisational forms in contemporary society. It is impressed on the students that projects can only succeed if the project's environment and its stakeholders (context) are taken into account in the project management process. The course is structured around the major phases all projects go through (ideation, initiation, preparation, start, execution, and final completion). During each phase the students are introduced to: purpose, decision making, analytical tools, and documentation. Special emphasis is put on the phases 'initiatiation' and 'preparation', and the students have to produce a project description, which is presented at a kick-off seminar. After the kick-off seminar, the project description is adopted according the received feedback, and submitted as an essay. In conection with the implementation phase, the students are taught project steering (meetings and reports). In relation to the completion phase, the students are taught how to evaluate projects.* |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Fyrilestrar, samrøður, venjingar.<br><br>*Lectures, dialogue and exersices.* |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Eftir lokið skeið skal tann lesandi<br><br>• Hava tilognað sær grundleggjandi vitan um projektarbeiði sum organisatións- og leiðsluform. |

| | |
|---|---|
| | • Duga at greiða frá teinunum (fasurnar) øll projekt fara ígjøgnum, og hvat hesir teinar fevna um.<br>• Duga at gera eitt projektgrundarlag.<br>• Duga sjálvstøðugt at reflektera yvir og eftirmeta prosessina í einum projektarbeiði.<br><br>*After the completed course, the student will have:*<br><br>• *Acquired basic knowledge about project management as a form of organisation and management.*<br>• *Be able to describe the different phases all projects go though, and what these phases encompass.*<br>• *Be able to write a project description*<br>• *Be able to independently reflect on and evaluate the process of a project.* |
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Munnlig próvtøka við støði í skrivligum projektgrundarlagi (verkætlanarlýsing). Projektgrundarlagið skal verða umleið 3-5 síður til longdar.<br><br>*Oral exam based on a written project description. The project description shall be approximately 3-5 pages.* |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Uttanseturs próvdøming.<br><br>*External examination* |
| **Próvtalastigi**<br>***Marking scale*** | 7-talsstigin<br><br>*The 7-Point Marking Scale.* |
| **Lestrarlisti**<br>***Bibliography*** | Millum 200-300 síður.<br><br>*Between 200-300 pages.* |
| **Ábyrgd**<br>***Contact*** | Jens Christian Svabo Justinussen<br><br>Undirvísari/teacher: Dánjal Pauli Haraldsen |